# Skulu halda høvdið kalt

**Hóast hann í nógvar mátar hevur kenslurnar uttaná, nú hann fyri seinastu ferð skal leiða StÍF-liðið inn á vøllin, so er Costin Dumitrescu ikki í iva um, at hann má vera ísakaldur, meðan dysturin fer fram**

GULLDYSTUR
*Jákup Mørk*



*- Sjálvandi gleði eg meg eisini nú at koma heim, men samstundis eri eg ótrúliga keddur av at fara úr Føroyum, sigur Costin Dumitrescu, nú hann fyri seinastu ferð skal leiða StÍF inn á vøllin*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Tað er ein spentur venjari hjá strandingum, sum nú ger seinastu fyrireikingarnar til stóra gullbrakið í Vestmanna. Tey trý árini hann hevur verið venjari hjá StÍF, hevur hann á hvørjum ári verið partur av steypafinaluni, men FM-heitið hevur hann ongan tíð vunnið, og nú er helst seinasti møguleikin í so máta. Costin Dumitrescu hevur nevnliga boðað frá, at hann nú flytir aftur til Rumenia, og sostatt ikki verður venjari hjá strandingum komandi ár.

### Skulu hugsa klárt

Tá vit royna at fregnast um, hvussu tú sum venjari kanst fyrireika liðið hjá tær til ein slíkan dyst sum tann í Vestmanna, svarar venjarin smílandi, at hetta mest gongur fyri seg á sálarliga økinum.

- Mín uppgáva nú er einamest at syrgja fyri, at leikararnir eru klárir í høvdinum. Eg skal halda teimum til, men samstundis ræður um at finna eina javnvág. Tað er jú skjótt, at tú kanst gerast ovurspentur í slíkum førum, og tað gevur ikki nakað gott, um so er.

- Men tað er ein stórur dystur. Ivaleyst tann størsti dysturin í føroyskum manshondbólti í fleiri ár, og hetta duga leikararnir eisini at skilja. Hetta er eisini møguleikin hjá okkum at tryggja, at vit vinna nakað, hóast vit ikki vunnu steypafinaluna í ár, og í so máta kann hetta gerast besta ári hjá mær sum venjari.

### Kensluborin

Og sum sagt, so verður hetta eisini seinasta árið hjá Co stin sum StÍF-venjari. Og hann dylur heldur ikki fyri, at persónligu kenslurnar verða nógvar, tá hann fer á vøllin.

- Tað fer at standa nógv á. Ver vísur í tí.

- Eg haldi tað vera eitt sindur løgið, nú eg skal gevast her. Fyrr hevur tað altíð verið so, at eg gleddi meg til at koma heim. Eitt nú tá eg spældi sum yrkisleikari í Eysturríki. Men hesa ferð er tað øðrvísi. Sjálvandi gleði eg meg eisini nú at koma heim, men samstundis eri eg ótrúliga keddur av at fara úr Føroyum.

- Árini, sum eg havi havt her, hava snøgt sagt verið ótrúlig. Eg havi møtt blíðskapi, sum eg ikki trúi var til. Tað er kanska at taka ov rívan til, um eg sigi eg havi kent meg elskaðan, men eg havi verið ótrúliga væl móttikin. Hava trupulleikar verið, hava fólk alla tíðina skilt hesar, og eg haldi ikki eg kann siga, at eg hevði ynskt nakað øðrvísi hesi árini.

- Nú verður tað tó seinastu ferð á hesum sinni, men hvør veit. Kanska komið eg aftur eina aðru ferð, eru kenslubornu orðini, sum vit fáa á vegnum.

- Men tá dysturin er, havi eg ikki ráð at hugsa um hetta. Tá ræður um at vera fullkomuliga »cool«. Vit hava stríðst í 23 dystir fyri at standa soleiðis, sum vitr gera nú, og eg orki ikki tankan um, at tað skal gerast av við málmuni millum okkum og VÍF. Tá er skjótt at leita aftureftir fyri at vita, hvar eitt einstakt stig skuldi verið vunnið, og tað tænir ikki nøkrum at hugsa soleiðis, so tí vil helst sleppa undan, sigur rumenski venjarin hjá StÍF at enda.

# Judokappingin endað

**Seinasta umfar av liðkappingini í judo varð leikt á Oyrarbakka um vikuskiftið.**

JUDO
*Tíðindaskriv*

Í dreingjadeildini var tað longu greitt áðrenn hetta seinasta umfarið, at Havnar Judofelag hevði vunnið kappingina, men teir fingu sera harða mótstøðu hendan dagin, og vunnu sínar dystir sera tepurt.

Dystin móti Sunda Judofelag vann HJFa 6-4 við leikstigunum 30-20.

Verri gekst við innanhýsis dystinum móti HJFb. Hesin dysturin gjørdist javnur í stigum, 5-5, men HJFa hevði betri úrtøku í leikstigum, 21 móti 16, so teir vunnu hendan dystin akkurát.

Endaliga støðan í dreingjadeildini gjørdist:

| | | |
|---|---|---|
| 1 | HJFa | 16 stig |
| 2 | SJF | 8 stig |
| 3 | HJFb | 0 stig |

Hjá unglingunum var sera stórur spenningur hendan dagin.

Tey fyrstu umførini vann Havnar Judofelag allar dystirnar í unglingadeildini, men í seinnu hálvu var tað Sunda Judofelag, ið dróg longra stráðið.

Kravið til Sunda Judofelag hendan dagin var fyrst og fremst at vinna, men fyri at tað skuldi vera nóg mikið at vinna meistaraheitið, so máttu teir fáa meira enn 13 leikstig meira enn HJF.

Hetta megnaði Sunda Judofelag eisini. Teir vunnu nevniliga greiðan sigur, 3-0 við leikstigunum 30-0. Ein partur av frágreiðiningini upp á munin var tann, at Havnar Judofelag manglaði ein av sínum sterkastu leikarum, men sjálvt við honum hevði HJF ikki megnað at vunnið meistaraheitið í ár.

Sostatt fingu tey bæði judofeløgini úr Havn og Sundalagnum eitt meistaraheitið í part í liðkappingini í ár, og tað ynskja vit teimum til lukku við.



*Havnar Judofelag vann gull í dreingjadeildini við hesari manning: Torvald Abrahamsen, Eirikur Jákupsson, Ellindur Lydersen, Símun H. Lútzen og Sjúrður Lydersen.*



*Unglingarnir hjá Sunda Judofelag, sum gjørdust Føroyameistarar, vóru hesir: Jákup Sumberg, Johannes Hansen, Hjalmar Johannesen, Teitur Reinert Joensen og Jógvan Páll Kristiansen.*



# Brøndby sendi FCK úr steypakappingini

**Jón Rói Jacobsen var alla tíðina á beinkinum, meðan Todi Jónsson slapp upp í part síðstu tjúgu minuttirnar á Brøndby stadion**

ÚTISETAR
*Jóannes Hansen*



*FCK-venjarin sigur seg ivast í, hvussu væl fyri kropsliga Todi Jónsson er. Men ta løtuna, sum Todi var á vøllinum, var einki, sum bendi á, at hann var verri fyri enn hinir spælararnir*

Meðan hitastigini í góða várveðrinum heima á landið mikudagin vóru 10–12, so var tað bítandi kalt í Danmark, har fjórðingsfinalurnar í steypakappingini, DONG Cup, vórðu spældar, meðan kavaflikrur dalaðu yvir spælarar og áskoðarar.

Úrslitini hava við sær, at liðini, sum nú skulu telvast um plássini í finaluni, sum verður í Parkini Kristi himmalsferðardag, eru Brøndby, AaB, FCM og Viborg. Tað var óvæntað, at Viborg á heimavølli vann 5–2 á Farum, sum eftir fyrra umfarið var á odda 2–0. Tá sá einki út hjá Viborg venjaranum. Men eftir sigurin verður roknað við, at hann longdi um lívið sum ábyrgdarmaður fyri botnliðnum í superliguni í hvussu so er í eina viku afturat.

Næstved var á odda ímóti AaB, men so varð munurin millum bestu og triðju bestu deildina eyðsýndur, og AaB vann 4–1. FCM vann á heimavølli 3–1 ímóti Esbjerg, og so var tað uppgerðin millum Brøndby og FCK.

Hóast bítandi kuldan vóru 20.769 áskoðarar á Brøndby stadion. Í 1. hálvleiki var lítið at rópa hurrá fyri, men eftir steðgin øktist intensiteturin, sjálvt um poleraða fótbóltsspælið ongantíð kom fram.

Tiggju minuttir eftir steðgin fluktaði ein av nýggju Brøndby spælarunum, Peter Foldgast, einasta málið. Síðstu løtuna royndi FCK at leggja trýst á, men teir komu ikki nærri málið, enn tá fríspark frá liðformanninum, Peter Nielsen, brast í tvørtræið.

Michael Laudrup, Brøndby venjarin, tykist eftir stuttari tíð at hava megnað at mynda eitt fínt lið. Uttan at støðið er tað sama, so minnir menningin av unga liðnum í Brøndby ikki sørt um tað, sum Alex Ferguson útinnti í Manchester United miðskeiðis í níti árunum. Tá setti hann nógvar ungan spælarar á liðið, tað royndist sera væl, og teir vunnu meistaraheitið.

### Todi eina løtu á vøllinum

Frá fyrsta bríksli mikukvøldið var eingin føroyingur á vøllinum. Eins og sunnudagin, tá somu liðini spældu í Parkini, var Jón Rói Jacobsen á beinkinum hjá Brøndby allar 90 minuttirnar.

Ímóti ætlanini, sum FCK leiðslan hevur havt higartil í ár, so høvdu teir hesa ferð Toda Jónsson í hópinum. Hann sat í 1. hálvleiki væl innballaður á beinkinum, meðan Peter Møller og Jörgen Pettersson vóru í álopinum. Men FCK hevði lítla tyngd í álopspartinum, og tá ið 2. hálvleikur var hálvrunnin, og Brøndby var komið framum, varð Todi settur á vøllin.

Tað var ikki eiti á góðum ummælum, sum Todi fekk frá frásøgumonnunum í sjónvarpinum. Teir undirstrikaðu enn eina ferð, at Todi telist millum bestu álopsspælararnar í Danmark, og at tað er ein lætti fyri mótstøðuverjurnar, tá ið hann ikki er á FCK liðnum.

FCK venjarin, Hans Backe, hevur aftur og aftur í vár og eisini í donsku bløðunum mikudagin sagt, at hann ivast í, hvussu væl fyri kropsliga Todi Jónsson er. Men ta løtuna, sum Todi var á vøllinum, var einki, sum bendi á, at hann var verri fyri enn hinir spælararnir. Hann var fleiri ferðir við í samanspæli, sum næstan bar møguleikar við sær, og eitt nú var tað týðuligt, at Zuma, sum aftur hesa ferð var á miðvøllinum í høgru, hevði gagn av, at Todi kom á vøllin. Men FCK fekk einki mál, og harvið hava teir ikki enn vunnið í vár. FCK hevur spælt fýra dystir.

Sunnudagin verður eitt nýtt umfar í superliguni. Tá skal Brøndby, sum ikki hevur tapt higartil í ár, spæla á útivølli ímóti OB, og FCK fer í Parkini at spæla ímóti Esbjerg.

### Bítur frá sær

Í donsku pressuni varð upp undir fjórðingsfinaluna mikukvøldið gjørt burturúr, at FCK venjarin, Hans Backe, er púra kaldur, sjálvt um tað higartil í vár ikki hevur gingið eftir vild, og venjarin vil ikki hoyra talan um, at hann skal gera tær stóru broytingarnar á liðnum, tí onnur halda tað. Hann hevur verið venjari í mong ár, og tekur sær ikki tykni av sovornum práti, sigur hann.

Í FCK eru í minsta lagi ellivu spælarar, sum hava støði at spæla í superliguni, men sum sjáldan fáa møguleikan, tí tað eru so nógvir um boðið. Venjarin undirstrikar, at spælararnir kunnu ikki rokna við, at hann fer at gera sosialar útskiftingar.

– Hetta er ikki nakar barnagarður. Tá ið spælararnir skriva sáttmála við FCK, vita teir, at talan verður um stóra kapping, og at tað bara verða teir, sum eg haldi vera teir bestu, sum sleppa á liðið. Eg velji liðið, og eg rokni við teimum, sum eg havi álit á. Um pressan og viðhaldsfólkini hava aðrar áskoðanir enn hana, sum eg havi, so mugu tey um tað. Eg leggi ikki petti í sovorðið trýst. Eg geri arbeiðið upp á mín máta. Um tað ikki er nóg gott, so hevur felagið møguleikan at velja sær ein annan venjara, vóru boðini frá Hans Backe til pressuna og harvið eisini til nógvu góðu spælararnar, sum sita á beinkinum ella als ikki sleppa upp í part á besta liðnum.

# Føroyskt DM-gull

**Christoffer Olsen úr Havn gjørdi ikki mætari enn at vinna danmarksmeistaraheitið í Judo fyri ung**

JUDO
*Jákup Mørk*

Hetta er ikki fyrsta ferðin, at ungi havnarmaðurin ger um seg. Christoffur gongur í løtuni á øðrum ári í skúla í Danmark, og eitt nú vann hann bronsu í sterkasta bólkinum í eini altjóða judokapping, sum gekk fyri seg í Hillerød beint fyri jól.

Síðani hann fyri tveimum árum síðani fór undir miðnámsútbúgving sína, hevur Christoffur verið partur av liðnum hjá Gedsted-Vejen Judoklub, og sum skilst hevur venjingin her gingið sera væl, og hevur føroyski unglingin alla tíðina gjørt stór framstig.

Men hóast hann nú umboðar danskt judo-felag, so hevur Christoffur á ongan hátt gloymt røtur sínar. Um páskirnar verður hann soleiðis við á einum føroyskum liði, sum fer at taka lut í altjóða kappingini, Limfjords Cup. Harumframt skal hann í mai mánaði taka lut í NM-kappingini í judo. Tann kappingin verður hildin í Svøríki.

Hetta er annars ikki fyrstu ferð, at føroyingar gera vart við seg innan judo í Danmark. Fyri nøkrum árum síðani gjørdist Búgvi Poulsen eisini danskur meistari í sínum vektflokki, og eitt árið var hann tann íðkarin í donsku liðkappingini, sum hevði bestu dystarhagtølini.



*Ungi havnarmaðurin, Christoffur Olsen, kann nú rópa seg danskan meistara í judo*